# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Andreas Djurhuus, Porkeri**, vanliga nevndur Andreas undir Gjørðabrekku, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi leygardagin 16. september, 86 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Porkeris Kirkju mikudagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Andreas, kunnu lata Missiónshúsinum í Porkeri eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

**Kristoffur Jensen** fer til gravar úr Reerslev kirkju hósdagin 21. september kl. 13. Tey, ið vilja minnast Kristoffur kunnu lata eina peningagávu til Føroyafelag móti Krabbameini.

**Rúni Heinesen í Leirvík** andaðist mánadagin 18. september, 40 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Sommer Højgaard, Rituvík**, andaðist sunnudagin 17. september á Landssjúkrahúsinum, 82 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikukvøldið kl. 18 í Rituvíkar kirkju. Jarðarferðin verður hósdagin 21. september kl. 14 úr Rituvíkar kirkju. Tey, íð vilja minnast Sommer, kunnu lata Rituvíkar kirkju eina gávu. Konta í peningastovnunum.

## Listaskúlin á Sandi í Smiðjuni

Fríggjadagin 22. sep. letur upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík, har víst verður próvtøkuverkætlan hjá Ninu A. Arge frá Arkitektaskúlanum í Århus. Verkætlanin var eitt skitsuuppskot til ein møguligan listaskúla á Sandi.

**Opið verður soleiðis:**
Fríggjadagin 22. sep: kl 16-19
Leygardagin 23. sep: kl 12-16
Sunnudagin 24. sep: kl 14-16
Mánadagin 25. sep: kl 16-19
Týsdagin 26. sep: kl 16-19

**Móttøka**

Í sambandi við at nýggi dagstovnurin í Sørvági er tikin í nýtslu, verður boðið til almenna móttøku á dagstovninum, Kjóadalsvegur 1 , leygardagin 23. september frá kl. 14 til kl. 16.

Í hesum sambandi verður navnið á dagstovninum kunngjørt.

Sørvágs Kommuna

FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 332004 & 333122 • Fax +298 332952
E-mail: sorvag@sorvag.fo
www.sorvag.fo

# Andras Mortensen settur sum landsantikvarur



Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, hevur í dag sett Andras Mortensen í starv sum landsantikvar.

Andras Mortensen er 46 ára gamal og útbúgvin Cand.mag í søgu og latíni. Í 2001 vardi Andras Ph.D heitið frá Fróðskaparsetri Føroya fyri ritgerðina "Hin føroyski róðrarbáturin, sjómentir føroyinga í eldri tíð". Ritgerðin varð givin út í bók, og fyri hana varð hann heiðraður við virðisløn M.A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir.

Andras hevur starvast á Føroya Fornminnissavni síðani 1979. Fyrst sum hjálparfólk í lestrartíðini og síðani 1989 sum deildarleiðari á Fólkalívsdeildini á Fornminnissavninum. Eitt tíðarskeið var Andras gestagranskari við Stavanger Sjøfartsmuseum og hevur síðani 2003 verið adjungeraður lektari á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

Síðani 1. august 2005 hevur Andras Mortensen verið virkandi landsantikvarur.

Andras tekur við starvinum 1. oktober í ár.

# Fyrireika endurnýtsluhandil í Havn

**– Vit hava fleiri stuðlar úr Føroyum, og nú vilja vit fegin hitta hesi, sigur Bjarke Skaaning Petersen frá Folkekirkens Nødhjælp. Eitt av hansara arbeiðsøkjum eru endurnýtsluhandlarnir**

NEYÐHJÁLP
*Snorri Brend*

Á kvøld verður kunnandi fundur hildin um arbeiðið sum hesin felagsskapurin ger kring allan heimin.

Fundurin verður hildin í Miðlahúsinum í Vágsbotni, og har fer aðalskrivarin í felagsskapinum, Henrik Stubkjær at taka lut.

Endamálið við ferð hansara í Føroyum er fyrst og fremst at kunna um víttfevnda arbeiðið teirra.

Men ferðin hevur eisini eitt annað og meiri spennandi endamál: Ætlanin er at seta á stovn ein endurnýtsluhandil í Føroyum.

Tey eru vitandi um at nógvir føroyingar stuðla teimum, og nú er so vónin at hesi eisini eru áhugað í arbeiðinum við hesum handlinum.

Meiri verður at frætta um hetta á fundinum í annaðkvøld.

Sum skilst hava tey funnið egnað høli til ein slíkan handil. Tí kemur eitt fólk frá felagsskapinum við til Føroyar og sum hevur kunnleika um, hvussu ein innrættar ein slíkan handil.

– Vónandi koma nógv fólk á kunnandi fundin, sigur Bjarke Skaaning Petersen.

# Missiónsvinir hittast til ársfund

**Havn:** Í døgunum 21. til 24. september hevur Kirkjuliga Missiónsfelagið ársfund sín. Hann verður hildin í missiónshúsinum við Landavegin í Havn.

Byrjað verður hóskvøldið 21. september við møti, har Leivur Nattestad talar og Elsa Jacobsen endar.

Síðani verður hildið á fríggjadagin, tá eitt serstakt missiónsmøti verður, har trúboðarahjúnini Malan og Heri Kjærbo fara at greiða frá arbeiði teirra í afrikanska landinum Tanzania.

Annars verða bíbliutímar, møtir, ungdómsmøti og familjumøti á skránni hesar dagarnar. Seinasta møtið verður sunnudagin 24. september kl. 17.

**sb.**

# Nýggja brúgv og umleggja landsvegin

**Fossá:** 1. desember í ár er ætlanin at prosjekteringin av arbeiðinum við Fossá, sunnanfyri Haldórsvík skal verða liðug.

Arbeiðið umfatar gerð av nýggjari brúgv um Fossá, ið liggur millum Langasand og Haldórsvík. Í sama viðfangi verður landsvegurin millum báðar bygdirnar umlagdur.

Sambært tíðarætlanini so er prosjekteringin í gongd í løtuni. Síðani er ætlanin at arbeiðið skal bjóðast út komandi ár.

**sb.**

**Dagurin í morgin 20. september. Tobias.** Til minnis um tann Tobias, sum apokrýfiska bókin Tobits bók veit at siga frá. Navnið er hebráiskt og merkir Guð er góður.